Belgiski spælarin er stungin av

KÍ stendur spyrjandi, eftir at nýggi og tryggi miðverjin, sum teir annars høvdu fatan av var nøgdur við umstøðurnar, fór av landinum í gjár

KÍ VÓNBROT
Jóannes Hansen

Klaksvíkingar skilja einki. Fyri viku síðani fingu teir 20 ára gamlan belgiskan miðverja í felagið. Hann var dámligur, og at hann er ein finur fótbóltsspælari sást ólavsøkuaftan, tá ið KÍ spældi væl ímóti HB.

Hóskvøldið fóru tíðindini sum eldur um Klaksvíkina, at nýggi spælarin var rýmdur.

Hvussu hongur hetta saman, spyrja vit KÍ formannin, Gest Hovgaard:

– Tað er rætt, at belgiski spælarin er farin úr Klaksvík, og at hann fríggjamorgunin fór av landinum. Vit skilja einki av hesum, og eg má bara staðfesta, at fótbóltsheimurin ofta er heilt undarligur. Vit hava arbeitt nógv fyri at fáa viðurskiftini hjá spælaranum upp á pláss. Mikukvøldið klokkan ellivu søgdu vit honum og damuni, at nú var íbúðin, sum tey skuldu búgva í, klár at flyta inn í. Tey tóktust vera væl nøgt, og vit vóru samdir um treytirnar fyri, at hann skuldi vera í Klaksvík tað, sum er eftir av hesum kappingarárinum. Nú má eg bara staðfesta, at hann er farin avstað, og at hann ikki verður á KÍ liðnum. Eg kenni ikki orsøkina, tí vit hava ikki tosað við hann, síðani hann hósdagin fór úr Klaksvík.

Hetta sigur Gestur Hovgaard, sum annars vísir til Jákup í Stórustovu, sum hevur umboðað KÍ í samráðingunum við nýggja spælaran. Jákup er í løtuni í Noregi við U-17 landsliðnum, sum luttekur í NM kappingini.

Gestur Hovgaard heldur, at tað hevur verið hugaligt at sæð, hvussu dygt klaksvíkingar og norðoyingar hava tikið undir við arbeiðnum, sum var lagt í at fáa bústað, figgjarligt grundarlag og alt annað, sum tað var neyðugt at gera nakað við, áðrenn klaksvíkingar kundu gera avtalu við 20 ára gamla belgiaran, sum nú altso er á veg aftur til Belgia.

VB við tveimum dønum

Fleiri fremmanda menn skulu vera við til at lyfta VB úr niðurflytingarvandanum, sum teir higartil hava verið í

VB - KÍ
Jóannes Hansen

Vágbingar fara á Vágseiði í morgin at hava fleiri nýggjar kanónir á liðnum, tá ið teir ímóti KÍ skulu taka fyrsta stigið burtur úr niðurflytingar vandanum, sum teir hava verið í, síðani tað varð farið undir kappingina í ár.

Umframt Brian Andersen, álopsspælaran, sum hevur verið í felagnum í nakrar vikur, hava teir fingið ein verjukendan miðvallara afturat. Hann eitur Anders Sørensen og kemur úr Svendborg.

VB hevur vant í tvær vikur, og teir siga, at lagið er gott, og at teir hava góðar vónir um, at tað skal eydnast at fáa stigini, ið skulu til fyri at sleppa úr keðiligu støðuni. Eingin VB spælari er skaddur, og eingin er leikbannaður undan KÍ dystinum. Í øðrum umfari misti VB í evstu løtu sigurin í Klaksvík, tá ið KÍ javnaði til 2-2 við brotssparki. Ta ferðina vórðu tveir VB spælarar riknir av vøllinum.

Í fjør vann VB 2-1 á heimavølli ímóti KÍ.

Long summarfrí

Hjá KÍ er tað sjálvandi vónbrot, at nýggja álitið í miðverjuni hósdagin hvarv sum døgg fyri sól. Teir hava í venjingardystunum arbeitt við Ova Nysted í álopinum, men nú er spurningurin, hvussu nógv teir verða noyddir at endurskipa, nú verjuspælarin er horvin.

Aleksander Djordjevic hevur verið heima í Jugoslavia í summarfrí. Hann skuldi koma aftur í gjár. Atli Danielsen og Erling Fles hava eisini verið burturstaddir. Eisini teir skuldu koma aftur í gjár. At teir ikki hava vant fer ivaleyst at hava við sær, at teir ikki vera millum teir fyrstu ellivu í Vági.

KÍ spældi væl á ólavsøku. Í vikuni hava teir verið í Leirvík, og tá hekk spælið aftur væl saman. Teir vunnu 6-2. Álopsspælarin úr Esbjerg, Bymar, sum í morgin fer at spæla fyri fyrstu ferð í landskappingini, skoraði tvey mál. Í Klaksvík siga teir seg ikki kvíga fyri, at hann verður burtur, tá ið teir í morgin fara til Vágs. Hann sigst trívast væl har norðuri, og tað er ikki so undarligt. Hann er jú ættaður av Fanø.

Fleiri nýggir menn verða at síggja Eiðinum sunnudagin. Bæði VB og KÍ hava styrkt seg við útlendskum leikararum í summarsteðginum

Støðan, 1. deild menn

		dystir	v	j	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	B36	10	7	1	2	23	8	15	22
2	HB	10	6	3	1	25	13	12	21
3	NSÍ	10	5	4	1	20	9	11	19
4	B68	10	4	5	1	12	7	5	17
5	KÍ	10	5	2	3	11	15	-4	17
6	EB/Streymur	10	3	4	3	16	18	-2	13
7	GÍ	10	3	3	4	12	15	-3	12
8	FS Vágar	10	2	1	7	12	23	-11	7
9	VB	10	1	3	6	10	20	-10	6
10	Skála	10	1	0	9	6	19	-13	3

Støðan, 2. deild menn

		dystir	v	j	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	ÍF	8	7	1	0	19	6	13	22
2	Sumba	8	5	2	1	21	5	16	17
3	VB	8	4	1	3	15	10	5	13
4	TB	8	4	1	3	17	13	4	13
5	AB	8	3	3	2	15	10	5	12
6	KÍ	8	4	0	4	14	24	-10	12
7	LÍF	8	3	1	4	9	17	-8	10
8	B71	8	2	1	5	12	10	2	7
9	B36	8	1	3	4	10	13	-3	6
10	B68	8	0	1	7	4	28	-24	1

Fríða Lómstein, leiðari á barnagarðinum, avmyndað uttan fyri nýggja og stásiliga stovnin, sum hevur fingið navnið »Barnagarðurin á Mýrunum«

Hesi bæði fittu børnini síggja út til at hugna sær óført í nýggja barnagarðinum á Mýrunum í Runavík.

Barnagarðurin á Mýrunum í Runavík:

Nýggjur stovnur við ongum bíðilista

Hósdagin lat Barnagarðurin á Mýrunum í Runavík upp. Hetta er ein spildurnýggjur stovnur, har pláss er fyri 94 børnum. Í og við at nýggi stovnurin letur upp, hvørvur bíðilistin til ansingarpláss í kommununi

BARNAGARÐUR
Ingrid Bjarnastein/ Jens Kristian Vang

Runavík: Úti við Toftavatn í Runavík stendur ein stásiligur nýbygningur. Talan er nevniliga um nýggja barnagarðin í kommununi, sum hevur fingið navnið »Barnagarðurin á Mýrunum«.

Hósdagin var almenn móttøka, har høvi var at síggja stovnin, og nýggja navnið á barnagarðinum varð eisini avdúkað.

Nógv fólk kom á gátt henda dagin. Øll børnini, sum skulu slíta sínar skógvar á Mýrunum, og nógv forvitin foreldur og onnur vitjandi stukku inn á gólvið.

Kári Sverrisson undirhelt við gittara og sangi, og var nógv leskiligt hjá børnum og vaksnum at fáa sær.

Betri pláss

Barnagarðurin hevur annars seinastu 21 árini húsast undir Posthúsinum á Heiðavegi í Saltangará. Har hava umstøðurnar verið heldur trongar, og í eini vaksandi kommunu hevur tørvurin á nýggjum barnagarði verður stórur.

Í nýggja barnagarðinum er pláss fyri 94 børnum. 40 meira enn í tí gamla. Tvær vøggustovur eru og fýra barnagarðsstovur.

Uttandura umstøðurnar eru eisini munandi betri á nýggja stovninum, sum liggur í einum náttúruvøkrum og friðarligum umhvørvi.

Í og við at nýggi stovnurin letur upp, kann triðstørsta kommuna í landinum erpa sær við, at bíðilistin til ansingarstovn, hvørvur.

– Ein slíkur nýggjur stovnur hevur sjálvsagt nógv at siga fyri kommununa. Vit hava havt ein langan bíðilista, og at hann hvørvur, eru vit sjálvandi erpin av, sigur Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavíkar kommunu. Hann vísir á, at tað er ymiskt, sum hevur hjálpt til, at bíðilistin verður burtur. Millum annað tað, at ein stórur árgangur fer í fyrsta flokk í summar, og harvið fara nógv børn úr ansingarskipanini.

– Málið er sjálvandi altíð at halda bíðilistan á null, men hetta avhongur alt av, hvussu fólkavøksturin í kommununi er.

Tá íbúgvaratalið í Runavíkar kommunu var hægst í 90´unum vóru gott og væl 2.500 íbúgvar, og tá tað var lægst undir kreppuni vóru 2.280 fólk. Í dag er fólkatalið á knøppum 2.600 íbúgvum, og er tað hægri enn tað nakrantíð hevur verið.

– Kommunan veksur støðugt. Kanska ikki so skjótt, men hetta er ein positiv gongd, sum vit hava, sigur Rodmundur Nielsen at enda.

Barnagarðurin á Mýrunum letur upp mánadagin 4. august, og tá verður byrjað at taka børn inn. Tann eina stovan letur ikki upp beinanvegin, men børnini verða slúsað inn, so hvørt.

Kári Sverrisson sang og undirhelt børnunum, tá almenn móttøka var hósdagin.

Tilboðsferðir
frá Atlantic Airways
Vikuskiftisferð til Keypmannahavnar
1.795,-
Sarlig APEX-ferð til Keypmannahavnar
2.095,-
Vikuskiftisferð til Billund
1.795,-
Sarlig APEX-ferð til Billund
2.095,-
ATLANTIC AIRWAYS